# Smyril fær trý pláss í Havn

**Møguleikarnir hjá nýggja Smyrli at sleppa til bryggju í Havn skulu betrast munandi. Ein alternativ atløga skal nú gerast undir Havnaskrivstovuni, men verður ikki klár, tá skipið kemur til landið um ikki so langa tíð**

SAMFERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Smyril liggur her væl við Farstøðina. Men tá nýggi Smyril kemur verður tað ikki allar dagar at hann kann liggja á hesum staðnum. Tí mugu ábøtur gerast á rampuna inni við Havnaskrivstovuna*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Enn veit eingin við vissu, nær nýggi Smyril kemur til landið. Men á landi skal í øllum førum alt gerast klárt til móttøku av hesum stásiliga fari.

Á Drelnesi er nýggja samferðsluhavnin liðug og tikin í nýtslu. Nú eigur høvuðsstaðurin tørn, og tað var júst eitt mál í hesum sambandi, sum varð avgreitt á býráðsfundi í Havn hóskvøldið.

Samtykt varð nevniliga at gera ábøtur á havnalagið, soleiðis at hetta nýggja skipið somuleiðis kann fáa bestu umstøður at leggja at undir Havnaskrivstovuni í Havn.

Hetta arbeiðið er mett at kosta 5,2 mió. kr., men verður kortini neyvan liðugt, tá Smyril kemur til landið.

Við hesum "nýggja" atløguplássinum fer nýggja strandfaraskipið í veruleikanum at hava trý atløgustøð við eystaru bryggju í Havn.

### Mánamorgun er ringast

Í løtuni hevur Smyril fleiri møguleikar fyri atløgum í høvuðsstaðnum: Við Farstøðina og á Molanum, og nú skal somuleiðis betrast munandi um hesar umstøður undir Havnaskrivstovuni.

Tað hevur tó víst seg, at skipaferðslan og tað virksemið ið hartil hoyrir, er rættiliga stórt á havnalagnum ávísar dagar í viku, og tí hevur Smyril havt skiftandi atløgupláss.

Ringast í so máta er kortini mánamorgun, tá Norrøna kemur úr Danmark, samstundis sum annaðhvørt Blikur ella Lómur hjá Skipafelagnum avskipa farm inni undir Havnaskrivstovuni. Tá hevur ikki verið annað pláss til Smyril enn at leggja seg á Molanum. Soleiðis kemur helst eisini at verða í framtíðini.

Hetta hevur ikki altíð verið so heppið, tí skulu trailarar í land, er í fyrsta lagi trupult at manerera umborð, og tá komið er í land, er heldur ikki altíð so einfalt at snara inneftir, tí brimgarðurin er fyri.

Havnameistarin, Jónsvein Lamhauge sigur við Sosialin, at við nýggja Smyrli verða møguleikarnir at koma í land munandi betraðir. Skipið kann í høvuðsheitum liggja, hvar tað skal vera, tí tað er væl útgjørt við stórum síðuportrum og hevur tí ikki tørv á eini rampu sum so.

– Men hetta við trimum atløguplássum slepast ikki undan, soleiðis sum støðan er í dag, sigur hann.

### Tryggja havbotnin

Smyril er ikki komin enn, men tað er kortini greitt, at tá tan n nýggi kemur kann hann ikki leggja at á plássinum undir Farstøðini við allar komur og fráferðir.

Tí er neyðugt, at hann verður lagdur annaðhvørt uttast á Molanum ella í krókinum undir Havnaskrivstovuni. Tað er í hesum sambandi, at neyðugt er at gera nakrar ábøtur á havnalagið.

Í stuttum umfata hesar ábøtur at ein setur upp fendarastubbar á Molanum og undir Havnaskrivstovuni, og at ein dýpir og tryggjar havbotnin á hesum støðum. Neyðugt verður somuleiðis at gera ábøtur á dekkið á rampuni undir havnaskrivstovuni.

Sagt verður, at ístaðin fyri at gera smærri ábøtur á dekkið á rampuni, ber eisini til at breiðka rampuna munandi. Hetta fer so aftur at føra við sær, at lættari verður hjá bilum at koyra í land, eins og ein kann brúka báðar rampurnar á Smyrli.

– Hinvegin so er vansin tann, at atløgubryggjan verður munandi styttri, verður sagt.

### Betongdýna

Málið hevur verið til umrøðu í fleiri av nevndunum í býráðnum, og verður mælt til at gera hesar ábøtur inni í krókinum við Havnaskrivstovuna.

Bryggjan er her gjørd av betongpelum, og tí eru møguleikarnir fyri at dýpa botnin ikki teir bestu. Her verður skotið upp at taka ein part av grótfylluni burtur, og ístaðin leggja eina sonevnda betongdýnu. Henda skal forða fyri undirmating av bryggjuni.

Ein slík betongsdýna er ikki áður roynd í Føroyum, men er kend í Noregi, har tey hava sera góðar royndir við henni.

Í samband við viðgerðina er havnameistarin komin við tilmæli um at arbeiðið skuldi bjóðast út í innbodnari lisitatión millum trý feløg, Byggitek, Articon og J&K Petersen.

Eftir at lisitatiónin var liðug mælti havnameistarin til at taka av lægsta tilboðnum, sum var frá Articon og sum ljóðaði uppá slakar 3,2 mió. kr. Ætlanin er somuleiðis at leggja sonevndar gabiónir á botnin, sum verða fyltar við betong.

Samlaði kostnaðurin fyri alt prosjektið verður tí 5,2 mió. kr., og hava bæði havnanevndin, fíggjarnevndin og at enda býráðið samtykt at taka undir við hesum uppskotinum.

# Dagstovn til børnini í Nólsoy

**Tórshavnar býráð hevur samtykt at byggja nýggjan barnagarð í Nólsoy. Arbeiðið verður liðugt í komandi ári.**

BARNAANSING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Nólsoyingar fáa nú barnagarð. Hann skal standa liðugur um eitt ár*

Um eitt gott ár fáa børnini í Nólsoy møguleika at fara í ein dagstovn á fyrsta sinni. Økið til henda bygningin er longu klárt, og á býráðsfundi í Havn hóskvøldið varð samtykt at fara undir henda barnagarðin sum skjótast.

Arbeiðið fer kortini at taka ta tíð, sum krevst. Men gongst sum ætlað stendur ein nýggjur barnagarður, sum eisini hevur vøggustovu og frítíðarskúla, liðugur í fyrru helvt av 2006. Kostnaðurin er mettur til 6,5 mió. kr.

### 42 børn

Tórshavnar kommuna hevur í sáttmálanum um samanlegging við Nólsoyar kommunu viðtikið at gera ein dagstovn í Nólsoy.

Í Nólsoy er eitt øki longu sett av til dagstovn, sum eftir ætlan skal rúma bæði vøggustovu, einum barnagarði og eini frítíðarstovu. Hetta økið er partvíst byggibúgvið.

Ætlanin er, at hesin stovnurin skal standa liðugur um eitt ár ella so.

Talið av børnum er mett til 42, av hesum verða tey 32 í vøggustovuni og barnagarðinum, og 10 teirra í frítíðarskúlanum. Barnagarðurin sjálvur verður 437 fermetrar stórur, og gevur hetta eitt fermetratal sum er áleið 10 fermetrar fyri hvørt barnið. Samlaði kostnaðurin av hesi ætlanini er mettur til slakar 7 mió. kr. Men tá meirvirðisgjaldið er drigið frá kemur kostnaðurin niður á góðar 6,5 mió. kr.

Í sambandi við viðgerðina í býráðnum hava trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælt til at játta 2 mió. kr. av íløgujáttanini á barnaansingarøkinum í ár, og at restupphæddin verður sett á íløguætlanina fyri 2006.

Undir viðgerðini tók mentamáladeildin undir við ætlanini, men mælti tó til at rúm skal gerast fyri fýra børnum aftrat, uttan at kostnaðurin verður broyttur.

Á fíggjarnevndarfundi í farnu viku varð avgjørt at taka undir við ætlanini, og tað sama gjørdi býráðið eisini hóskvøldið uttan atkvøðugreiðslu.

## Kristilig summarstevna í Klaksvík

Eins og undanfarin ár fer Kirkjuliga Missiónsfelagið aftur í ár at skipa fyri eini summarstevnu. Í ár verður Ósáskúlin í Klaksvík karmur um hetta tiltakið.

Stevnan byrjar hósdagin 30. juni og heldur fram til sunnudagin 3. juli.

Í ár verða eini norsk hjún gestir á stevnuni. Talan er um Annu og Norvald Yri, sum áður hava verið trúboðarar í Tanzania. Har var hon m.a. við til at seta á stovn ein sjúkrasystraskúla.

Norvald arbeiðir í dag sum undirvísari á bíbliuskúlanum á Fjellhaug í Oslo, og kemur undir Føroyavitjanini at tala á møtum og at hava bíbliutímar.

Enn er tann endaliga skráin fyri summarstevnuna ikki tøk, men arbeitt verður við henni í løtuni.

**sb.**

## Góð undirtøka til urgufund

Seinnapartin í dag fara urguleikarar og onnur áhugaði at hittast til fundar í Fríðríkskirkjuni á Toftum.

Á fundinum er ætlanin at tosa nærri um, hvat gerast kann fyri at bøta um tann stóra tørvin á urguleikarum í kirkjunum kring landið.

Líkt er til, at hetta evnið hevur stóran áhuga manna millum. Seinnapartin hósdagin vóru omanfyri 50 fólk meldaði til henda fundin.

Onnur evni verða eisini tikin fram, m.a. hvussu ein gevur víðari tann føroyska sálmaskattin í eini tíð, har tað vindur meiri og meiri uppá seg at syngja á enskum máli.

Tað er Urguleikarafelagið sum skipar fyri fundinum, sum byrjar í dag kl. 13 við einum døgverðabita. Við hesum verður vónað, at prátið millum luttakararnar kann byrja beinanvegin, so at sum mest fæst burtur úr hesum seinnapartinum.

**sb.**